## Grand Prix kappingin 2022

Grand Prix kapping verður aftur í 2022. Stig verða luta út eftir enda plássunum í eini kapping.

Stigini verða luta soleiðis:

Nr. 1 enda pláss í eini kapping gevur 7 stig

Nr. 2 enda pláss í eini kapping gevur 5 stig

Nr. 3 enda pláss í eini kapping gevur 4 stig

Nr. 4 enda pláss í eini kapping gevur 3 stig

Nr. 5 enda pláss í eini kapping gevur 2 stig

Nr. 6 enda pláss í eini kapping gevur 1 stig

Restin av enda plássunum geva 0 stig.

Tá tað eru færri enn 6 skjúttar í M-bólkinum, heldur stigaskipanin fram niðureftir í plássunum í A-bólkinum.

### Kappingar

Grand Prix verður í SKEET og TRAP.

Allar almennar OL skeet kappingar í Føroyum, sum standa í kappingarkalendaranum hjá SkF fyri 2022, eru Grand Prix kappingar í SKEET.

Allar almennar OL trap og American trap kappingar í Føroyum, sum standa í kappingarkalendaranum hjá SkF fyri 2022, eru Grand Prix kappingar í TRAP.

Undantikið báðum greinum, eru blandaðar og sporting kappingar, sum t.d. F80 og harukappingin.

Skjútti sum hevur flest stig í SKEET aftaná Veðrakappingina, hevur vunnið kappingina í SKEET.

Skjútti sum hevur flest stig í TRAP aftaná Mikkjalsmessukappingina, hevur vunnið kappingina í TRAP.

Er javnt, verða enda pláss tald, t.v.s. fyrst verður hugt eftir hvør hevur flest 1. pláss, síðani 2. pláss, síðani 3.pláss, síðani 4. pláss, síðani 5.pláss og at enda 6.pláss.

Er framvegis javnt, fáa skjútarnir, sum eru javnir, sama enda pláss, og plássið aftaná fellur burtur.

Enda plássini 1 til 6 verða avgjørd, uttan mun til hvørjar finalur verða skotnar.

SKJÓTISAMBAND FØROYA
skot@skot.fo
http://skot.fo

## Vinningar

1. vinningur 3.000 kr.

2. vinningur 2.000 kr.

3. vinningur 1.500 kr.

4. vinningur 1.000 kr.

5. vinningur 750 kr.

6. vinningur 500 kr.

Vinningar skulu nýtast innan kalendaraárið eftir t.v.s. des. 2023. Vinningarnir skulu nýtast skjótingini at frama t.d. skjótivenjingar, skjótiskeið, kappingar, skjótiútgerð o.s.fr. Skjótisambandið skal góðkenna hvat vinningurin skal nýtast til.

## Samtykki

1. Reglur samtyktar á nevndarfundi í SkF, í Vestmanna tann 29. sept. 2021. Hildið verður fram við somu reglum og vinningum, og at javnstilla OL trap og American trap í TRAP kappingini.

SKJÓTISAMBAND FØROYA
skot@skot.fo
http://skot.fo